Hervør Pálsdóttir
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um Kvinnuhúsið, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at bøta um umstøðurnar hjá Kvinnuhúsinum at hjálpa kvinnum, ið eru harðskaptraktar?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka játtanina á fíggjarlógini til Kvinnuhúsið?
3. Hevur landsstýrismaðurin ítøkiligar ætlanir um at útvega Kvinnuhúsinum betri hølisviðurskifti við plássi fyri fleiri kvinnum, enn nú?

Viðmerkingar:
Í samband við altjóða dagin móti harðskapi móti kvinnum eru Kvinnuhúsið, Kvinnufelagið í Havn og Amnesty úti við einum tíðindaskrivi, sum vísir, at áheitanir til Kvinnuhúsið í ár eru øktar við 50% samanborið við 2019. Serliga eru fráboðanir um harðskap, har misbrúk av rúsevnum hevur verið partur av málinum, eksploderaðar við 256%. Hesin bólkur er serliga útsettur, tí tey detta niðurímillum fleiri skipanir. Kvinnuhúsið ger eitt megnar arbeiði fyri at hjálpa kvinnum, ið eru harðskaptraktar, men ein stór avbjóðing hjá teimum eru hølisviðurskifti. Kvinnuhúsið hevur ikki nóg mikið av kømrum, og tí ber ikki altíð til at taka kvinnur inn. At áheitanirnar í ár eru eksploderaðar, sum tíðindaskrivið vísir á, vísir okkum, at politiska skipanin má traðka til og betra um viðurskiftini. Harðskapur móti kvinnum er ein samfelagstrupulleiki, sum vit mugu loysa. Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 25. november 2020

Hervør Pálsdóttir